

*Rómurin var øgiligur í føroyska umklæðingarrúminum, tá ið føroyska U17-landsliðið hevði syrgt fyri einari sannari sensation við at vinna 1-0 á Danmark.*

# Dreingirnir gjørdu dreymin til veruleika

**Føroysku U 17 dreingirnir framdu týskvøldið rættuligt bragd, tá ið teir í Finnlandi megnaðu at seta donsku javnaldrarnar upp á pláss**

U 17 NM KAPPING
*Jóannes Hansen*

Eftir stórtapini í Europa Cup kappingunum er hetta ein sólskinssøga fyri føroyskan fótbólt í altjóða høpi. Týskvøldið framdu føroysku U 17 dreingirnir rættuligt bragd. Tá syrgdu teir fyri, at dreymurin um, at tað skuldi eydnast at vinna á einum av hinum liðunum gjørdist til veruleika í fyrstu royndini í hesi NM kappingini. Teir bastu Danmark 1–0. Málið skoraði Christian R. Mouritsen við beinleiðis frísparki úr 30 metrum, tá ið tað restaðu tíggju minuttir.

– Talan var um framúr avrik. Á so góðum undirlagi, sum eg ongantíð áður havi sæð, hildu okkara seg hundrað prosent til tað, ið var avrátt. Danir høvdu bóltin eitt sindur meiri enn okkara, men okkara vóru á ongan hátt niðurspældir, og danskarnir vóru ikki serliga vandamiklir. Teir royndu nógv úti frá, men royndirnar vóru einki neyvar. Vit høvdu tveir aðrar stórar møguleikar. Tveir minuttir eftir steðgin sendi Christian R. Mouritsen av brotsteigar markinum og á tvørtræið, og tá ið 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamalur var Kristoffur Jacobsen um at gerast leysur, men málverjin, sum varð skaddur í hesi støðuni, byrgdi fyri.

Tað er Bill Jacobsen, sum saman við Heðini Askham hevur ábyrgdina av liðnum, ið greiðir frá úr Vaasa í Finnlandi, har hitastigini í fyrrakvøldið vóru eitt sindur fleiri enn tjúgu.

Bill Jacobsen hevur verið við í fleiri ár, og hann heldur liðið hesa ferð er eitt tað besta, sum hann hevur havt við at gera.

– Uppstillingin er 4–2–3–1. Levi Hansen var sterkur fremsti maður, og aftanfyri hann var Christian R. Mouritsen sera týdningarmikil spælari, sum var miðdepil, tá ið okkara royndu at mynda álop. Saman við teimum báðum vóru tað Kristoffur Jacobsen í høgru og Jóhan Ellingsgaard í vinstru, sum vóru við í álopspartinum. Hinir seks røktu fyrst og fremst verjupartin. At vit høvdu nógvar aftarlaga bar við sær, at vit ikki vórðu kollrendir av snarálopum. Tað hava vit áður ofta upplivað.

## Fyrireikingin

Føroyska ferðalagið var sera væl fyrireikað til avbjóðingina ímóti Danmark. Danska liðið var í kendu 4–3–3 uppstillingini, sum Morten Olsen eisini nýtir á besta danska liðnum, og har tað gongur nógv út uppá skjótt vongspæl.

– Tað var týdningarmikið hjá okkum at skerja møguleikarnar hjá teimum í vongspælinum, og tað eydnaðist væl hjá Torkili Kollsker í høgru og Tony Kruse í vinstru. Sentralu miðvallarnir Bogi Løkin og Ólavur í Ólastovu og miðverjarnir Einar Hansen og Jóhan T. Davidsen vóru sannir brandar. Vit høvdu ikki rættuliga hóming av, hvussu málverjarnir fóru at standa seg. Rógvi Ryggshamar byrjaði inn. Hann fekk ein snudd í 2. hálvleiki. Tá loysti Mattias Samuelsen hann av. Málverjarnir vóru rættuliga tryggir, og allir innskiftararnir stóðu seg optimalt. At vit vunnu komst av, at allir vístu framúr avrik, sigur Bill Jacobsen, sum eisini vísir á, at tað gagnaði føroyska liðnum, at leikferðin ikki var so høg.

Sum 2. hálvleikur leið, tóku føroyingarnir at møðast. Fleiri fingu sinadrátt, og íslendski dómarin mundi halda talan vera um tíðarspill. Hann legði níggju og ein hálvan minutt afturat. Tað man sjáldan ella kanska ongantíð vera komið fyri áður. Í føroysku leguni vóru teir ovurfegnir um úrslitið, men staðfestu samstundis, at tað tykist kosta at vera lítil!

Sinadráttirnir og tíðin, sum tað tók, tá ið Einar Hansen fór fram at tveita long innkøst, var ein løta, men tað kemur sjáldan ella ongantíð fyri, at fleiri enn fimm minuttir verða lagdir afturat.

FAKTA

### Føroyar-Danmark 1-0 (0-0)

1-0 Christian Mouritsen 72.

**Føroyar:** 1. Rógvi Rygshmar LÍF(16. Mathias Samuelsen KÍ 63.), 18. Torkil Kollsker HB, 3. Jóhan Davidsen NSÍ, 4. Einar Hansen NSÍ, 2. Tonny Kruse EB/Streymur - 6. Kristoffur Jakobsen KÍ(9. Pætur T. Jørgensen HB 80.), 8. Bogi Løkin NSÍ, Ólavur í Ólavstovu HB liðsk., 17. Johan Ellingsgaard B36(5. Sigtór A. Petersen FS Vágar 74.) - 10. Christian Mouritsen HB, Levi Hansen B36(15. Rói Mohr Danielsen B36 80.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12.Brian Hansen EB/Streymur, 13. John Hansen B36, 14. Jón Krosslág VB
**Venjari:** Bill McLeod Jacobsen
**Hjálparvenjari:** Heðin Askham
**Fysioterapeut:** Fanny Kruse
**Liðleiðari:** Thom Jakobsen
**Ferðaleiðari:** Rúni Heinesen

**Danmark:** 1. Jesper Christiansen FC Midtjylland(16. Christian Kier OB 51.) - 5. Rasmus S. Christiansen Lyngby, 9. Frederik Krabbe AGF, 3. Kristian Bo Andersen Brøndby, 13. Anders D. Randrup Brøndby - 17. Alexander Vorobjov B93(7. Dennis Høegh AGF 41.), 11 Jeppe Poulsen AB(10. Matti Lund Nielsen OB 58.), 12. Mike Lindemann Jensen Brøndby liðsk. - 18. Per Weirauch Hvidovre(4. Mark Hjort B1913 75.), 2. Nikolaj M. Agger Brøndby, 6. Nicklas Bendtner Arsenal
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 8. Theis Pedersen NFA, 14. Heine L. Kristensen AaB, 15. Troels Christiansen NFA
**Venjari:** Hans Brun Larsen
**Venjari:** Per Andersen
**Lækni:** Lars Poulsen
**Liðleiðari:** Henry Matthiesen
**Dómari:** Eyðjólfur Magnus Kristinsson Ísland
**Linjuverjar:** Jonas Turunen og Ilpo Simonen úr Finlandi
**4. dómari:** Svein O. Moen úr Noreg



# Orkan er stóri spurningurin

**Sigurin á Danmark verður mettur at kosta so nógva orku, at møguleiki er fyri, at tað skal ganga út yvir næstu avrikini**

U 17 NM KAPPING
*Jóannes Hansen*

Lagið var sjálvandi ógvuliga gott í føroysku leguni í Finnlandi í gjár. Tað er ólíka at fara upp at fyrireika seg til næsta dystin, tá ið talan í fyrstu royndini hevur verið um tepran sigur, enn tað onkra ferðina hevur verið, tá ið føroyskir unglingar – eftir at teir hava givið alt, sum teir hava havt í sær – hava lagt rygg til stórtap. Onkra ferðina hevur talan verið um tvísifrað tøl.

– Vit hava fingið nógv herðaklapp frá teimum, sum sóu dystin. Sjálvandi eru vit ikki ósamdir við teimum, sum siga, at talan tykist vera um støðuga framgongd á føroyska liðnum, sigur Bill Jacobsen, sum er annar av venjarunum.

Fyrrapartin í gjár vandu føroyingarnir. Talan var sjálvandi ikki um serliga tunga venjing. Heldur spentu spælararnir frá og ladaðu battaríini uppaftur. Í gjárkvøldið klokkan 18.30 skuldu Føroyar spæla ímóti Onglandi.

– Stóri spurningurin er, hvussu tað fer at verða við orkuni. Spælararnir góvu alt, sum teir høvdu í sær, ímóti Danmark. Hósdagin er frídagur. Hann fer at koma væl við, áðrenn síðsti dysturin verður á skránni fríggjadagin ímóti Svøríki, sigur Bill Jacobsen.

Týskvøldið spældu Svøríki og Ongland. Úrslitið var 1–0 til Ongland. Eingin í føroysku leguni í Finnlandi ivast í, at talan er um tvær stórar avbjóðingar. Eftir at Føroyar vunnu 1–0 á Danmark roknar eingin við, at Ongland og Svøríki skuldu undirmeta føroyska liðið.



*Teir ellivu ið byrjaðu dystin fyri Føroyar: Standandi frá vinstru: Bogi Løkin NSÍ, Torkil Kollsker HB, Jóhan Davidsen NSÍ, Einar Hansen NSÍ, Tonny Kruse EB/Streymur og Ólavur í Ólavsstovu HB. Sitandi frá vinstru: Rógvi Rygshamar LÍF, Kristoffur Jakobsen KÍ, Levi Hansen B36, Johan Ellingsgaard B36 og Christian Mouritsen HB*




**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg- Leðurinntrekk- Sóltak- El. rútar- El. spegl- Fj. Stýrt Centrallás-Radio-Alufelgur-Spoylarar v.m.
Sertilboð kr. 198.000,-



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v.Reduktións-gear -Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-C.D.Anlegg v.m.
Kr. 118.000.



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition-Automat-gear-Regnsensor-El. stýrt føraraset-ur-El rútar fr.+ aftan-El.spegl-Fjarð stýrt centrallás-Hita í forrúti-C.D.anlegg-Mjørkal.-Leður róður v.m. ( Nýprísur: 325.800,- ).
Kr. 218.000.



**NISSAN ALMERA 1.6 GX**
Árg Maj 1998, Km 61.900. Vælhildin: Alufelgur -C.D.Anlegg - Fjarðstýrt centrallás - El. Rútar - El. Spegl v.m.. Kr. 98.000.



**DAIHATSU CHARADE 1.0 5 HURÐAR**
Árg Jun-93, Km 79.000. Vælhildin: Nýsýnaður - Radio v.m. Kr. 30.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 71.000. El.rútar.fr.- Valnød Instrumentbretti-Takboylar-Sleipikrók v.m..
Kr. 86.000.



**ROVER 620 TURBO INJECTION 200 HK**
Árg Jul-99, Km 94.000. Sera vælhildin: Top modellið- Leður Inntrekk-Sóltak-Aircondition Alufelgur-C.D.Anlegg v.m..
Kr. 168.000.



**OPEL ASTRA 1.6 STC. VØRUVOGNUR**
Árg Apr. 1999, Km 28.000. Sera vælhildin: Bert koyrt 28.000 km-Fjarðstýrt Centrallás-Radio v.Bandspælara-Takboylar v.m..
Kr. 75.000.



**LAST TIL PICK UP BILAR**
Sum nýggj Pick up Last við síðulúkum / aftan ( MVG fæst aftur av prísinum) . Kr. 4.500.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600**
**Fax 310650**

